TEKNISKI SKÚLIN
TÓRSHAVN



# søkir eftir lærara

Talan er um fast starv á:

- **Maskindeildini**

**Vit vænta, at tú hevur:**
- sveinabræv innan økið
- evni og hegni at arbeiða við ungdómi
- viðkomandi starvsroyndir
- hollan og dagførdan kunnleika innan økið

Fyrimunur er, um tú hevur víðari útbúgving og teldukunnleika.

**Vit bjóða:**
- eitt spennandi og avbjóðandi starv, saman við royndum starvsfeløgum
- møguleika fyri dagføring og eftirútbúgving innan økið
- løn sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og FTL.

**Tú:**
- skal senda umsókn við upplýsingum um útbúgving og royndum innan 21. juni 2007 til:

**Tekniska Skúlan í Tórshavn**
Postrúm 3239,
110 Tórshavn

Um tú vilt vita meira um starvið, kanst tú venda tær til:

**Helga Mortensen,** deildarleiðara á maskindeildini tlf. 308050

Starvið, sum umfatar undirvísing av maskinsmiðum og SIT-næmingum, skal setast 9. august 2007. Fyrstu 2 árini eru royndartíð, har tú, sum settur/sett verður í starv, má vera til reiðar at taka ta eftirútbúgving, tað verður seg námsfrøðiliga ella aðra førleikagevandi útbúgving, sum er neyðug fyri at verða settur/sett í fast starv.

**Maskindeildin** tekur sær av undirvísing av maskinsmiðum og SIT-næmingum. Á deildini starvast 6 lærarar og ein verkvørður

Eisini undirvísa lærararnir á eftirútbúgvingarskeiðum og í ávísan mun víðari útbúgvingum, sum skúlin hevur.

RUNAVÍKAR kommunuskúli
Glyvravegur 10A · FO 625 Glyvrar
Tlf. 447331 · fax 447767
t-postur: rks@skulin.fo

## Lærarastørv í Runavíkar kommunuskúla

Til skúlaárið 2007/08 verður søkt eftir 9 lærarum at byrja 1. august 2007.

- 3 lærarum í fast starv
- 6 lærarum í tíðaravmarkað fulltíðarstarv skúlaárið 2007/08 fyri lærarar í farloyvi.
- 1 lærara í tíðaravmarkað parttíðarstarv skúlaárið 2007/08 (u.l. 12 – 14 tímar) fyri tímaniðurskurð hjá lærarum.

Søkt verður eftir lærarum, sum kunnu lesa tímar í m.a. Innskúlingini, miðdeildini, framhaldsdeildini og í serstovunum.

Umsøkjararnir mugu hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinaøkjum: máli, støddfrøði, ítrótti, kunningarlærugreinunum, handaligu lærugreinunum, bókasavn og at arbeiða við næmingum við breki.

**Vit vænta, at tú**
- ert fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- ert virkisfús/ur og ert hugað/ur fyri toymissamstarvi
- í samstarvi við leiðslu og starvsfelagar vilt vera við til áhaldandi at menna skúlan

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið eru allir skúlarnir, sum hoyra til Runavíkar kommunuskúla. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjamálaráðið og Føroya Lærarafelag. Størvini eru treytað av, at tímajáttanin heldur.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvum, c.v. og møguligum ummælum skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. juni 2007, kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um starvið frá Ásmund Lamhauge, skúlastjóra á tlf. 447331 & 217331 ella Duritu P. Joensen, varaskúlastjóra á tlf. 447331 & 221363.

**Runavíkar kommunuskúli** hevur komandi skúlaár um 463 næmingar og um 55 starvsfólk. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/rks

SKÁLA



SKÚLI

Skálavegur 194 · FO-480 Skála
Tlf. 441368 · Fax 441360
skalask@post.olivant.fo
www.skulin.fo/ska

## Lærarastørv og starv sum stuðul í Skála skúla

**Hesi størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2007:**
- 2 tíðaravmarkað størv, fulla tíð, vegna avlopstímar, lækkað tímatal, serligan tørv
- 1 tíðaravmarkað starv, uml. fulla tíð, vegna serligan tørv. Endaliga tímatalið verður ásett eftir 1. sept.
- 1 starv sum stuðulsfólk 10 tímar um vikuna til næming við serligum tørvi.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarv við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- eru við til áhaldandi at menna skúlan

**Harafturat skulu lærararnir hava førleika at átaka sær:**
- undirvísa gentum og dreingjum í ítrótti og svimjing.
- undirvísa í náttúru/tøkni og alis-/evnafrøði
- undirvísa í tónleiki og evning
- annars átaka sær undirvísing í øðrum lærugreinum.
- flokslærarauppgávuna

**Førleikakrøv**
Lærarаútbúgving og helst linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

**Lønar- og setanartreytir**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so, at tann, ið settur verður, er tænastumannasettur lærari frammanundan.

Størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4

Starvið sum stuðul verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknir**
Umsøknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera fyrstalæraranum í hendi í seinasta lagi týsdagin 25. juni kl. 16.00.

Meira kann fáast at vita um størvini frá fyrstalæraranum Hans Jákup Andreasen á tlf. 442118 ella 586005.

Internet

Sosialurin
www.sosialurin.fo

DEKKMASTER.FO Fastir, lágir prísir

Bílig og góð dekk til persónbilar, vøruvognar & jeepar ...eisini øll tey kendu

...tá ið prísurin eisini er avgerandi!

Summardekk á goymslu:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 175/70-13 økonomidekk | 540,- | 205/55-16 økonomidekk | 890,- |
| 175/65-14 økonomidekk | 620,- | 205/55-16 Michelin Primacy | 1.290,- |
| 185/60-14 økonomidekk | 675,- | 205/40-17 økonomidekk | 965,- |
| 185/65-14 Bridgestone B250 | 690,- | 225/45-17 økonomidekk | 995,- |
| 195/50-15 Bridgestone ER300 | 790,- | 225/45-17 Bridgestone ER300 | 1.525,- |
| 195/65-15 økonomidekk | 795,- | 225/40-18 økonomidekk | 1.290,- |
| 195/65-15 Goodyear Excellence | 910,- | 225/40-18 Continental Sp. Con. | 1.890,- |

Send ein teldupost ella ring og hoyr nærri um júst tíni dekk!

www.dekkmaster.fo · info@dekkmaster.fo · telefon 227 000

## Kassafólk

Søkt verður eftir fólki at passa kassan og fylla vørur upp fyrrapartar og seinnapartar, aðruhvørja viku og annanhvønn leygardag, at byrja beinanvegin ella smb. avtalu.

Keypmaðurin "úti í Grønlandi"
JOHANNES ANDREASEN
Pf. Johannes Andreasen · Grønlandsvegur 16
Tel. 31 20 87 · ja@post.olivant.fo